FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# NÁMSFRØÐINGUR SØKIST

**»Kambur« søkir námsfrøðing at byrja 16. februar 2009.**

Kambur bjóðar tilboð til 6 ára gomul og er eisini frítíðarskúli næmingum í fyri 1. og 2. flokki í Fuglafjarðar skúla.

Stovnurin hevur opið frá klokkan 07.30 til 17.15.

Vit sóknast eftir einum námsfrøðingi, ið hevur dirvið at seta dagsskránna, bæði fyri tey 6 ára gomlu og frítíðarskúlabørnini.

Vit vænta at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert ja-lig/ur, dugir at samstarva, tekur ábyrgd og dugir at seta tær mál.

Vit bjóða eitt spennandi starv, ið støðugt er í menning, har tú kanst verða við at mynda og seta tín dám á stovnin. "Kambur" liggur í einum náttúruríkum umhvørvið, har ið náttúran náttúrliga setur sín dám á gerandisdagin.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 40 tímar um vikuna, við møguleika fyri niðursettari arbeiðstíð.

Starvið verður sett frá 16. februar 2009.

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Lønarstig 11 – 18.

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Skrivlig umsókn skal vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. februar 2009 kl. 12.

Fuglafjarðar kommuna
Norður í Gerði 10b
FO-530 Fuglafjørður

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow, leiðari, telefon 73 77 91.

# Kassafólk

Søkt verður eftir fólki, seinnapart, at passa kassan og fylla vørur upp á hillar. At byrja beinanvegin ella smb. avtalu.

*Keypmaðurin "úti í Grønlandi"*
*JOHANNES ANDREASEN*
Pf. Johannes Andreasen · Grønlandsvegur 16
Tel. 31 20 87 · ja@post.olivant.fo

# Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**

Runavíkar Kommuna

# Pedagogar til Dagstovnin í Skálafirði

Søkt verður eftir pedagogum til barnagarðin at byrja 01.mars 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini at søkja er:**
2 pedagogar til Dagstovnin í Skálafirði 30 t/v. til 35 t/v.

Dagstovnurin í Skálafirði læt upp 1.apríl 2007. Á stovninum eru 2 vøggustovur og 1. mars letur ein barnagarðstova upp. Vit eru ein stovnur undir Runavíkar Kommunu og halda til í leiðaðum hølum í Kelduni í Skálafirði.
Umstøðurnar á stovninum eru góðar, hølini eru rúmlig og ljós.

**Vit ynskja**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin Pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkaðstarv.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 212252 ella 442252.

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:
Dagstovnin í Skálafirði
Skálafjarðarvegur 26
FO – 485 Skálafjørður

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 29.01.09

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139 · FO-600 Saltangará



# UMVÆLING /UNLOCK

Umvæling/Unlock av fartelefonun.

Sí nærri : http://www.unlockarin.dk

**Ring: 598005 Skriva til: unlock@tpost.fo**

# Les Sosialin so ert tú við

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# LÝSING EFTIR DAGRØKTARUM

Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 16. februar 2009.

Í dagrøktini í Fuglafirði arbeiða 8 dagrøktarar.

Spælistova er knýtt at dagrøktini. Í dagrøktini ganga 40 børn, í aldrinum 0 – 6 ár.

Størvini talan er um, eru tíðaravmarkaði fram til summarferiuna 2009.

Ein treyt fyri at søkja størvini er, at dagrøktarheimið skal verða barnavinarligt innrættað, har rúm er til børnini at spæla, og at eitt hóskandi trygt spæliøki er uttanfyri.

**Vit vænta at tú:**
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug at skapa ein tryggan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 73 77 94.

Møguligar umsókinir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi leygardagin tann 07. februar 2009.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN
Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

# Bilvaskari

Starv sum bilvaskari hjá politinum í Tórshavn er leyst at seta frá 16. februar 2009.

Løn verður veitt eftir avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til telefon nr. 35 14 48.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. februar 2009.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 21. januar 2009
Karen Marie Olesen